Skjal A

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 31/2020

Av tí at eg sum lið í einum granskingarprojekti, eri í holt við at kanna virknaðin av løgtinglóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, havi eg hugt nærri at pørtum av lógaruppskotinum um at broyta skipanina við tillagaðum starvi.

Eg havi gjørt eina stutta kanning av, hvussu inntøkan hjá teimum, ið fáa løn útgoldna sambært verandi skipan, verður broytt sum fylgja av uppskotinum. Hetta er gjørt, tí eg meti at viðmerkingarnar til lógaruppskotið ikki á fullgoðan hátt lysa hesi viðurskifti.

Sostatt manglar, bæði í viðmerkingunum til lógaruppskotið og í frágreiðingini um uppskotið borið fram í miðlunum, ein samanbering, ið lýsir munin í inntøku, sum kemst av broytingini í skipanini, sum verður galdandi frá ársskiftinum 2021.

Eisini havi eg gjørt eina samabering av skipanini í lógaruppskotinum við verandi lønarískoytisskipan í Danmark. Eg havi valt at gera eina samanbering við skipanina í Danmark, tí at uppskotið um at mótrokna lønarískoyti í inntøkuni frá arbeiðsgevara, er nærum sama loysn, sum hevur verið galdandi í Danmark seinastu árini.

Eg havi valt ikki at gera fleiri viðmerkingar til broytingarnar viðvíkjandi javning av veitingum, enn tað, ið er borið fram í lesarabrævi fyrst í oktober.

Broyting av lønarískoyti

Sambært lógaruppskotinum, verður ein broyting gjørd í útrokningini av lønarískoytinum til tillagað starv. Hetta merkir, at lønarískoytið, sum Almannaverkið veitir, verður ásett lægri enn í verandi skipan. Samstundis verður ein stigvíst lækkandi mótrokning nýtt so hvørt sum inntøkan frá arbeiðsgevaranum hækkar. Mótroknað verður sostatt við 40% í lønarískoytinum so hvørt sum arbeiðsløn hækkar. Minsta inntøka frá arbeiðsgevara, ið gevur grundarlag fyri at fáa lønarískoyti er 2.000 kr, og sostatt verður ikki mótroknað í inntøku undir hesa upphædd.

Lønarískoytisskipanin um tillagað starv merkir, at avtala verður gjørd við arbeiðsgevara og arbeiðstakara um starv við støði í eini meting av írrestandi arbeiðsevni hjá viðkomandi starvsfólki. Almannaverkið ger metingina og ásett verður, hvussu nógv arbeiðsgevarin skal gjalda av sáttmálaløninni á økinum. Arbeiðsførleikin hjá arbeiðstakara skal sambært §21 í ll. um arbeiðsfremjandi tiltøk, verða minkað við í minsta lagi 1/3. Arbeiðsførleikin og sáttmálaløn eru sostatt avgerandi fyri, hvussu arbeiðsløn og lønarískoyti verður samansett, og merkir hetta at sáttmálaløn óansæð verður hægsta samlaða lønarlagi hjá viðkomandi.


Fyri at lýsa ávirkanina av lógarbroytingini, havi eg gjørt tríggjar samanberingar av lønarlag og arbeiðsførleika. Til samanberingar er brúkt dømi um mánaðarliga lønarinntøku sambært sáttmála hjá Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Lærarafelag og BLF. Lønarlagið er tó bert dømi um ávirkan av broyttu skipanini hjá fólki, ið fáa mánaðarløn á almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum.

Í sjálvum sær hevur tað kanska størri týdning at vita í hvønn mun inntøkan verður broytt um ein personur við staðfestum arbeiðsførleika fer í nýtt tillagað starv, enn at vita hvussu nógv verður útgoldið í lønarískoytinum í mun til arbeiðsløna, sum verður lýst í logaruppskotinum og í miðlunum annars.

Tá ið skipanin við tillagaðum starvi tekur støði í mánaðarligu sáttmálaløninni, er einki grundarlag hjá viðkomandi at forvinna hægri løn, og sostatt siga samanberingarnar, sum verða nýttar í lógaruppskotinum ikki serliga nógv um broytingarnar, ið standa fyri framman.

Sáttmálin hjá Føroya Arbeiðarafelag

Sambært lønarsáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag er lægsta arbeiðsmannaløn á leið 23.200 kr. um mánaðin. Á myndini sæst, hvussu nógv verður goldið av arbeiðsgevara og hvussu nógv er lønaríkoyti hjá arbeiðstakara, ið hevur arbeiðsførleika millum 10% og 70%.



Sum myndin vísir, verður inntøkan hjá arbeiðstakara við minni enn 30% arbeiðsførleika minni enn sáttmálaløn (Reyði og blái stappin tilsamans). Viðkomandi fær ávikavist 20.700 kr./mðn. og 22.100 kr./mðn. orsakað av at lønaríkoytið verður lækkað frá 22.000 kr. til 18.552 kr.


Fyri hesi bæði nevndu, er samstundis galdandi, at inntøkan aftaná at nýggja utrokningin verður sett í verk, verður lægri enn í verandi skipan. Hetta er lýst sum munurin í stappamyndini. Munurin er ávíkavist 2.300 kr./mðn. og 920 kr./mðn.

Sáttmálin hjá Føroya Lærarafelag

Sum annað dømi, havi eg brúkt sáttmálaløninga hjá lærara, ið starvast á 21. lønarstigi sambært sáttmálanum. Hetta merkir, at viðkomandi hevur eina mánaðarløn á umleið 31.300 kr.

Myndin vísir, at um viðkomandi hevur 70% arbeiðsførleika, fær viðkomandi fulla sáttmálaløn sambært nýggju skipanini við tillagaðum starvi.


Eisini sæst, at hjá teimum, ið bara hava 10% ávikavist 20% arbeiðsførleika, verður inntøkan í nýggju skipanini beint undir støði á sáttmálaløninni hjá Føroya Arbeiðarafelag. Inntøkan hjá viðkomandi minkar við upp í 6.000 kr./mðn. um skift verður til nýtt starv sambært nýggju skipanini. Tað velst í høvuðsheitum um staðfesta arbeiðsførleikanum.



Dømið vísir eisini, at inntøkan hjá teimum, ið hava 30% arbeiðsførleika, verður minni í nýggju skipanini, enn samsvarandi inntøka, um viðkomandi fær miðal fyritíðarpensjón umframt lønarinntøku. Hetta merkir sostatt at framhaldandi, verður ein møguleiki at fleiri fara at fáa miðal fyritíðarpensjón í staðin fyri lønaríkoyti, um viðkomandi hevur miðal-høga sáttmálaløn.

Sáttmálin hjá BLF

Eitt dømi, ið lýsir ávirkanina av broyttu skipanini hjá fólki við hægri løn, kann takast úr lønartalvuni hjá BLF. Sum dømi nýtast lønarstig 7 (av 9), ið gevur eina mánaðarliga inntøku á 40.300 kr.



Myndin vísir, at um viðkomandi hevur 10% arbeiðsførleika, verður samlaða inntøkan undir sáttmálalønina hjá Føroya Arbeiðarafelag. Myndin vísir eisini, at øll, ið fáa tillagað starv, sambært nýggju skipanini, fáa nógv minni um mánaðin enn við verandi skipan. Tó so at viðkomandi skal í minsta lagi hava helvtina av

arbeiðsførleikanum fyri at fáa fulla sáttmálaløn í verandi skipan. Størsti munurin millum verandi skipan og nýggja uppskotið er ein inntøkumissur á 9.000 kr./mðn.

Samanumtikið kann sigast at, at tað tykist sum um lógaruppskotið ikki hevur tikið broytingunum í útrokningarfrymlinum til skipanina við tillagaðum starvi í nóg stórum álvara. Í lógaruppskotinum verður ikki hugt eftir ávirkanini á inntøkuni hjá teimum, sum hava ein staðfestan restarbeiðsførleika, ið hevur tydning fyri samansetingina av arbeiðsløn og lønarískoyti hjá viðkomandi.

Eisini tykist tað eitt sindur villleiðandi, tá greitt verður frá, at inntøkan hjá øllum í tillagaðum støvum, verður í minsta lagi á støði við lægstu sáttmálalønina hjá Føroya Arbeiðarafelag – óansað um tað bert er sagt í mun til broytingarnar hjá teimum, ið eru í verandi skipan.

Samanbering við aðrar skipanir


At enda fari eg at gera eina samanbering av nýggju skipanini við tillagaðum starvi við skipanina við "løntilskud" í Danmark. Hetta er ein skipan, sum í flestu førum kann samanberast við føroysku skipanina, tó so at eisini er talan um týdningarmiklar munir á øðrum økjum.

Útrokningargrundarlagið í donsku skipanini, er ein mótrokningarfrymil, har mótroknað verður á tveimum háttum. Lønarískoytið í donsku skipanini er 18.701 kr. í 2020 og mótroknað verður í øllum upphæddum fyrst við 30% og seinni við 55% um arbeiðsløn er omanfyri 14.965 kr.

Støðið undir lønarískoytisskipanini í Danmark er ein "munandi skerdur arbeiðsførleiki" og hetta verður mett gjøgnum tiltøk, ið eisini kunnu samanberast við arbeiðsfremjandi tiltøk, tó so at talan er um eina kommunala fyriskipan.

Sagt verður frá samanberingum við onnur lond, tá ið talan er um inntøku, ið er arbeiðsløn og lønarískoyti tilsamans. Landsstýrið ynskir sostatt í størri mun at samanbera inntøkuna og ikki skipanirnar sum er. Hetta tykist løgi, tá ið lønarlag og kostnaðarstøði ikki kunnu samaberast millum Føroyar og Danmark.

Men um inntøkur frá skipanum skulu samanberast, má hædd takast fyri at arbeiðsgjøld, pensjón og frítíðarløn leggjast aftrat føroysku veitingini. Í donsku skipanini er galdandi at pensjónin er íroknað lønini, tá mótroknað verður. Munurin í lønarlagi er sostatt 10-15%.



Um samanborið verður við inntøku svarandi til lægstu sáttmálalønina hjá Føroya Arbeiðarafelag, kann lesast á myndlinum, at nýggja føroyska skipanin við tillagaðum starvi, gevur eina hægri samlaða inntøka hjá teimum, ið hava minni enn 30% restarbeiðsførleika. Hjá hinum er inntøkan nærum eins.

Um arbeiðsinntøkan er hægri, merkir tað eisini at munurin hjá hinum bolkunum av arbeiðsførleikum, verður hægri og at føroyska skipanin tykist at geva eina hægri inntøku. Orsøkin er tó í høvuðsheitum, at frítíðarløn og pensjón verður lagt aftrat føroysku veitingini.

Sum heild, er talan um, at við at venda aftur til gomlu ásetingina í §22, ið varð galdandi frá 2013 til 2017, verður føroyska skipanin við lønarískoyti til tillagað starv, vend aftur til eina skipan, ið kann samaberast við donsku skipanina við lønarískoyti.

Vinaliga,

Michael Feldballe, Ph.d.-lesandi

Fróðskaparsetur Føroya / Roskilde Universitet